# Fróðskaparrit og Mentunargrunnur Føroya Løgtings

*Maud Heinesen*
Fróðskaparfelag Føroya, Handan Á 5, FO-100 Tórshavn, Faroe Islands
email: maudh@setur.fo

Í fimti ár hevur Mentunargrunnur Føroya Løgtings (nú Mentanargrunnur Landsins) staðið sum útgevari av Fróðskaparritum, Annales Societatis Scientiarum Færoensis, árbókum Føroya Fróðskaparfelags, ið her koma út við 50. bók í røðini.

Við stuðuli frá Mentunargrunninum var longu á stovnandi aðalfundi felagsins 17.12.52 eitt av miðum felagsins rokkið – ið hvussu er fyri fyrst: "Á føroyskum máli (at) geva út Fróðskaparrit, ið er felagsárbók". Hetta hevði sjálvsagt kravt ávísar fyrireikingar. 15.5.1952 senda J. Rasmussen, jarðfrøðingur og H. D. Joensen, landslækni Mentunargrunni Føroya Løgtings hetta skriv (her endurgivið í heilum líki):

> *Tá* "Heiðursrit til Rasmus Rasmussen" í fjør varð givið út, lá okkum undiriritaðu í huga, at hetta skuldi vera fyrsta roynd til føroyskt fróðskaparrit, og ætlanin var tá at halda fram, so eitt rit fór at koma árliga. Okkum er nú kunnugt, at nóg nógvir menn eru, sum huga hava at styðja hetta tiltak við tilfari.
>
> Kostnaðurin av útgávuni er sum vant her í Føroyum hin størsti meinbogin og serliga við tílíkari bók sum hesari, har innihaldið ikki beinleiðis er fólkalestur.
>
> Tað tykist okkum at vera av stórum týdningi, at menn, sum starvast á vísindaligum økjum, sleppa at leggja frá sær úrslit í føroyskari ritgerð, sum í útheiminum kann umboða Føroyar vísindaliga og menntunarliga.
>
> Undirritaðu hava tingast við landsstýrismann, harra Richard Long, um spurningin og hava eftir ráðum hansara sent skriv og tekningarlista til haldarar í allar bygdir. Hesir listar kom inn aftur fyrst í juni (sí hjáløgdu fylgiskjøl). – Vit hava fingið tilboð uppá tílíka bók frá prentsmiðunum og meta bókina til í mesta lagi at koma uppá 3ooo kr. (talvu- og myndatilfar uppí roknað).
>
> Vit loyva okkum tí við hesum at heita á Menntunargrunn Føroya Løgtings og biðja um, at grunnurin vil átaka sær ta peningaligu ábyrgdina, ið stendst av hesi útgávu, kortini so, at allur peningur, sum inn kemur av sølini fer inn aftur í grunnin.
>
> Um grunnurin tekur hesa ábyrgd, átaka vit undirritaðu okkum ritstjórastarvið.
>
> \+ fylgiskjøl
>
> Við hávirðing
> J. Ramussen, jarðfrøðingur, mag.sc.
> /H. D. Joensen, landslækni.

Svarið frá Mentunargrunninum, dagfest 1.10.1952, á brævpappír hjá Føroya landsstýri, stílað til harra Hans Debes Joensen, landslækna, Tórshavn, er soljóðandi (somu leiðis endurgivið í heilum líki):

Í skrivi frá frá 15. mai 1952 hava Hans Debes Joensen, landslækni og Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingur, Tórshavn, heitt á mentunargrunnin um at taka uppá seg ta peningaligu ábyrgdina av einum fróðskaparriti.

Tað er upplýst, at einir 200 høvdu sett seg fyri ritið uttanfyri Tórshavn og einir 150 vóru væntandi í Tórshavn.

Umsóknin var til viðgerðar á fundi 12. august 1952, har stýrið samtykti at lata mentunargrunnin taka uppá seg ábyrgdina av útgávuni í ár fyri fyrst, men treytað av, at mentunargrunnurin stendur sum útgevari og fróðskaparfelagið sum fyrireikari av ritinum.

Hetta verður hervið gjørt kunnugt.

M.v.
(undirskrivað P. Petersen)

Hetta er upprunin til tað samstarv millum Fróðskaparfelagið og Mentunargrunnin – endurnýggjað í fleiri umførum, tó ikki uttan skrivligar frágreiðingar og tingingar – ið hóast alt hevur tryggjað útgávuna av Fróðskaparritum til dagin í dag. Her verður endurgivið skriv dagfest 18. mars 1955 frá Føroya Fróðskaparfelag til Mentunargrunn Føroya Løgtings, ið eftir inngang um tey bæði skrivini omanfyri, heldur fram:

Á fundi við harra Rich. Long, táverandi landsstýrismanni, og harra Poul Petersen, løgtingsmanni, í mai 1952 varð semja gjørd um, at undirritaðu skuldu senda út tekningarlistar til bygdirnar í Føroyum og til Keypmannahavnar, og at undirritaðu annars skuldu átaka sær avgreiðsluna av bókabýtinum við útheimin sum ætlanin var at gera um felag fekkst burtur úr hesari roynd. Mentunargrunnurin vildi so sjálvur átaka sær at útvega haldarar í Havn og avgreiðsluna av ritinum í Føroyum.

Tað eydnaðist undirritaðu at fáa umleið 270 haldarar á bygdunum (fyri 10 kr. árliga), og bókabýti við umheimin varð longu byrjað tíðliga á vári 1953 og er alsamt vaksið síðani. Yvirlit yvir hetta bókabýti sæst á hjálagda lista. Hesar bøkur og tíðarrit, sum ganga inn í Vísindadeildina á Føroya Landsbókasavni vera fyri ein part varðveittar á Hans Andriasarstovu í Bátahøllini, síðani á Landsbókasavninum og ein nøgd – mest læknabókmentir – á Landssjúkrahúsinum. Undirritaðu hava her fingið stak góðan stuðul frá Sverra Fon, bókavørði, og serliga frá N. P. Holm, eygna- og oyrnalækna, sum at kalla einsamallur hevur staðið fyri læknabókmentunum og gjørt eitt ógvuliga stórt arbeiði fyri at útvega hesi millum 4 og 5000 tíðarrit og handbøkur.

Hóast Mentunargrunnurin higartil rakstrarliga hevur havt peningaligst tap av at geva út Fróðskaparrit, so skilst kortini, av hjálagda lista, at um tann nøgd av bókmentum, sum er fingin til vegar til Vísindadeildina – gjøgnum býti við Fróðskaparfelagið – verður mett í peningi, so verður hetta virði nógvar ferðir størri enn tær beinleiðis peningaligu útreiðslurnar.

Tá tær beinleiðis peningaligu útreiðslurnar hjá Mentunargrunninum higartil hava verið uppá seg stórar, so stendst hetta fyri ein part

av tí, at prentingarkostnaðurin hevur roynst størri enn upprunaliga ætlað, men eisini av tí at haldaratalið í Havn enn er at kalla einki.

Í 1953 og 1954 hevur Mentunargrunnurin sum avtalan upprunaliga var, staðið fyri avgreiðsluni av Fróðskaparriti í Føroyum, men av ymsum umstøðum buðu vit okkum sjálvir til at gera hetta í ár, umframt ritstjórn og bókabýti við umheimin. Vit kunnu kortini síggja at arbeiði við ritstjórn og bókabýti nú er vorðið so stórt at vit í framtíðini ikki kunnu átaka okkum avgreiðsluna afturat.

Eins og tað sæst av hjálagda lista viðvíkjandi bókabýtinum, er hetta býti nú vorðið rættiliga stórt og komið í fasta legu við nógvar vísindaligar stovnar í útlandinum, og við tað at so nógvir stovnar hava latið ritgerðarrøðir teirra fleiri ár aftur í tíðina – t.d. hevur Norske Videnskabernes Selskab í Trondhjem latið allar 3 røðir sínar 25 ár aftur í tíðina – vildi tað komið ógvuliga (illa) fyri, um hetta býtið skuldi støðga.

Vit halda tí, at tað nú er neyðugt at vita, um útgávan av Fróðskaparriti kann sigast at verða peningaliga tryggjað longur fram í tíðina, og skulu vit tí loyva okkum at biðja um, at Mentunargrunnurin vil játta at átaka sær útgávuna av Fróðskaparriti árini frameftir, kortini so, at ritstjórnin hvørt ár sigur grunninum frá frammanundan, hvussu nógv bókin ætlandi kemur at kosta, og at grunnurin samtykkir hesa ætlan, áðrenn bókin fer í prent.

Um Mentunargrunnurin ynskir fleiri upplýsingar, eru vit sjálvandi altíð tilreiðar at koma á fund saman við stýrinum.

Hetta skriv er tikið við her, ikki einans sum "umbering" fyri tað, sum á pappírinum tóktist at vera eitt hall av útgávuni av Fróðskaparritum, men eisini til tess at vísa á miðvísa arbeiði felagsins fram ímóti einum av endamálum sínum: at leggja støðið undir ein komandi lærdómsstovn í Føroyum. At Mentunargrunnurin hevur skilt "umberingina" rætt, sæst í ársfrágreiðing felagsins fyri 1954/55, har m.a. stendur: "Tað hevur higartil verið soleiðis, at felagið á hvørjum ári hevur søkt Mentunargrunnin um at taka útgávuna av ritinum uppá seg. Her er hend tann broyting, at grunnurin nú hevur tikið uppá seg at útgeva bókina fyri longri áramál fremeftir uttan at søkjast skal um hetta hvørt ár."

Tað vardi kortini ikki leingi, til boð aftur vóru eftir felagnum um útgávu og kostnað av Fróðskaparitum, og soleiðis hevur tað verið við jøvnum millumbilum upp ígjøgnum árini. Og rætt er, at inntøkurnar av Fróðskaparritum hava leingi verið í minking, men enn sum áður fær Mentunargrunnurin ágóðan av haldi og sølu, samstundis sum Føroya Landsbókasavn fær vísindarit í býti fyri Fróðskaparrit – og Supplementa til Fróðskaparrit, sum felagið gevur út. Her skal tó viðmerkjast, at eisini bókabýtið er minkað rættiliga fitt seinnu árini, í fáum førum av minkandi áhuga fyri ritunum hiðani, heldur av spariorsøkum á stovnunum, felagið hevur havt býtissamband við. Somuleiðis ger nýggja tíðin seg galdandi. Summi av tíðarritunum uttaneftir eru ikki longur til á pappíri, men koma út í talgildum líki.

Í 1. bók av Fróðskaparritum eru allir stovnararnir – og harvið fyrstu limir felagsins – umboðaðir: Rasmus Rasmussen, R. K. Rasmussen, H. D. Joensen, Axel Poulsen,

Karsten Hoydal, Niels á Botni, Hans Jacob Jacobsen, Jóannes Rasmussen, Sverri Dahl og Chr. Matras. Átta teirra vóru við á sjálvum fundinum, ið varð hildin í Hans Andriasar stovu, sum Petra Djurhuus stutt frammanundan hevði latið innrættað í Bátahøllini á Debsartrøð.

Hetta lítla felag er eftir fimti árum vaksið til eitt víttfevnandi "forum" við umleið 160 limum. Í limaskaranum eru bæði føroyingar og útlendingar, búsettir herheima og burturi. Tað er ikki longur eitt krav at hava skrivað grein í Fróðskaparritum til tess at gerast limur. Nýggj felagslóg var samtykt við gildi frá 1.1.90 – við broytingum á eykaaðalfundi 20.5.92 er hon galdandi lóg fyri felagið. Sbrt. henni kunnu limir í felagnum gerast føroyingar, sum í verki hava víst, at teir takast við gransking. Eftir umsókn ella uppskoti frá limum býður nevndin teimum limaskap, sum hon metir lúka hesa treyt. Í serstøkum førum kann nevndin eisini bjóða útlendingum limaskap.

Fróðskaparrit eru ikki nevnd í broyttu lógini, harafturímóti stendur, at eitt av miðum felagsins er at upplýsa alment um vísindalig viðurskifti við útgávuvirksemi og fundum. Sum heimurin er háttaður í dag, er líkt til, at hetta gerst ikki við einum riti á føroyskum burturav. Enskt er vorðið tað málið, granskarar, fyrst og fremst innan náttúruvísindi, nýta til at almannkunngera úrslit og avrik síni. Hetta hevur sjálvsagt eisini havt avleiðingar fyri Fróðskaparrit, har nú flestu greinir eru á enskum. Fyri ikki at sleppa tí føroyska upp á fjall, avgjørdi felagið, í tilknýti til lógarbroytingina í 1990 og 1992, at geva út eitt alment vísindaligt tíðarrit, ið fekk navnið Frøði. Enn sum áður er eitt endamál felagsins at menna føroyskt sum vísindamál, og tískil eru allar greinir í Frøði á føroyskum.

Um tað mundið tað spurdist, at Mentunargrunnur Føroya Løgtings skuldi verða umskipaður við nýggjari lóg, vóru samráðingar við Fróðskaparfelagið um, hvussu verða skuldi við samstarvinum millum grunnin og felagið um útgávu av Fróðskaparritum. Ein atvoldin var eisini, at útgávan av 47. bók gjørdist væl dýrari enn ætlað. Úrslitið var, at táverandi nevnd helt seg til – við ávísum treytum og í avmarkaða tíð – at lata Mentunargrunnin framhaldandi fíggja og standa sum útgevari av Fróðskaparritum.

Tá ið so nýggja lógin kom í mai 2000 við víðkaðum og fjølbroyttari uppgávum fyri grunnin (nú Mentanargrunnur landsins) var greitt, at rúmd var ikki longur fyri, at grunnurin helt fram sum útgevari av Fróðskaparritum, men kortini varð tó fingið í lag, at gamla samstarvið skuldi halda fram til og við 50. bók.

Umstøðurnar í 1952 vóru sjálvsagt heilt øðrvísi, enn tær eru í dag. Uppskot um at lata einum føroyskum vísindafelag í umbúna 3000 kr. av einari fíggjarlógarjáttan upp á 10.000 kr. til útgávu av einum fróðskaparriti á føroyskum, hevur neyvan verið lætt at taka støðu til, men har hevur felagið eftir øllum at døma havt onkran góðan forsprákara í nevnd Mentunargrunsins. Og góðir forsprákarar fyri felagið og ritið tykjast at hava verið í nevndini øll árini.Tískil hevur útgávan av ritinum borið til hóast broyttar umstøður..

Hvussu framtíðin verður fyri Fróðskap-

arrit, er ógreitt. Men undir øllum umstøðum vil felagið, nú tað kann halda 50 ára stovningardag sín, takka fyri tað samstarv, ið hevur verið við Mentunargrunn Føroya Løgtings (nú Mentanargrunn Landsins) um útgávuna, og fyri fíggjarliga stuðulin, ið hevur gjørt tað møguligt at geva Fróðskaparrit út nú á hálvtrýssindstjúgunda sinni.

"Tempora mutantur, nos et mutamur in illis" (tíðir broytast og vit í teimum). Tað er sum vera man eisini galdandi fyri mið og virkisøki hjá grunnum, feløgum og stovnum.